**FAKTA**

**Úrval av byggiverkætlanum sum Steingrund Akustik hevur verið við í. Antin í samband við nýbygging, umbygging ella útbygging**

**Mentanarhúsið í Fuglafirði, kirkjurnar í Vestmanna, Hoyvík og Gøtu, Almanna- og Heilsumálaráðið, Bakkafrost, Barnagarður Drotning Ingridar, Barnagarðurin á Mýrunum, Ebenezer, Eik (3 bygningar), Norðoya Sparikassi, Elektron, Eysturoyrar Røktar- og Ellisheim, Føroya Banka (2 bygningar), Føroya Tele, J & K Petersen (óljóð frá byggiplássi), Landsbyggifelagið, Landsverk, Løgmannskrivstovan, Rás2 studio, Nebo, Miðnámsskúlin, Norðurlandahúsið, Oasan, Sansir, Shell, Skúlarnir í Runavík, Rituvík, Toftum, Strondum, Søldarfirði, Løgmannabreyt og Venjingarskúlin, TAKS (Toll & Skatt), Tryggingarfelagið Føroyar. Harafturat hevur Johannes P. Steingrund gjørt nakað av uppskotum um ljóðdoyvandi tiltøk í sambandi við privata sethúsabygging**



***Eftir nógv ár í Danmark og Týsklandi flutti familjan Steingrund aftur til Føroya. Sum ljóðserfrøðingur setti Jóhannes Steingrund sær fyri at gera alt fyri at fáa inniljóðið í húsunum so gott sum møguligt. Millum annað gera ljóðdoyvandi loftsplátur sum hesar sera góðan mun í stovu og køki. Her er tað næstyngsti limurin í Steingrund-familjuni, Christian, ið styttir sær stundir framman fyri sjónvarpinum***



***Gjøgnum sítt arbeiði hjá donsku hátøknifyritøkuni, Bruel & Kjær, hevur Johannes Steingrund sjálvur verið við til at útviklað hesar báðar ljóðmátararnar, sum hann brúkar í sínum dagliga arbeiði at máta bæði ljóð og óljóð í bygningum, arbeiðsplássum, byggiplássum og hvar tað skal vera***



*Nógv kann gerast fyri at fáa ljóðviðurskiftini so góð, tá man byggir nýtt, men tað er ongantíð ov seint at gera nakað fyri at betra um ljóðið. Millum annað við at leggja serligar plátur upp undir loftið*



***Um tú ikki hevur stoypt dekk millum kjallara og miðhædd ber til at leggja eitt eyka sett av undirsløgum, sum loftið verður heft í***

# ggir

**FAKTA**

## Johannes P. Steingrund

| | |
|---|---|
| 1981 | studentur |
| 1981-83 | læraravikar, útvarpsteknikari |
| 1990 | sivilverkfrøðingur |
| 1990- | Brüel & Kjær |
| 1997 | HD í uttanríkishandli |
| 2001- | Sjálvstøðugur vinnurekandi |

**FAKTA**

## Byggireglur um ljóðviðurskifti

Arbeiðseftirlitið setir ávís krøv til ljóðviðurskifti á arbeiðsplássum, eitt nú í skúlum, barnagørðum, frítíðarskúlum, flakavirkjum og skrivstovum, men tað eru eingi krøv til privat sethús.

eftirklangstíðina, so til dømis tónleikur ikki er so gjøgnumtreingjandi, tá tú flytir teg eitt sindur frá hátalaranum. Tá ljóðviðurskiftini eru hørð í einum rúmi, nyttar tað nevniliga ikki bara at skrúva niður fyri ljóðstyrkini, tí sjálvt við lágari styrki kann tað virka belastandi fyri onnur enn tey, ið spæla tónleikin.

### Dupultan vegg og gólv

Eitt annað atlit, ið sambært Johannes Steingrund skal takast, tá tú byggir hús, er at hava rúm – eina gongd – ímillum, har sum friðarligt skal vera, og har ið larmur oftani er. At hjúnakamarið ikki liggur inn móti stovu ella barnakamari, har tað kann roknast við oftani at vera ófriðarligt, er vert at hugsa um.

Ber ikki til at gera eina gongd, er ein annar møguleiki. Nevniliga at byta veggin upp í tvey við tveimum settum av stillingum, sum ikki nerta við hvønn annan, so veggurin verður í tveimum, og afturat hesum at gera dupult lag av plátum

Eitt atlit afturat skal takast, um tú hevur innrættaðan kjallara ella loft. Serliga har talan er um meiri enn ta einu familjuna, ella um tú hevur fremmandar leigarar. Er ikki talan um betongdekk, ber til at gera gólvið við dupultum lagi av undirsløgum, har tað ovara lagið ber sjálvt gólvið, meðan loftið hongur í tí niðara lagnum. Hetta er nakað, sum Johannes Steingrund hevur latið gera í sínum egnu húsum, tí hann hevur skrivstovu í kjallaranum.

Hann vísir á, at nógvar óljóðkeldur eru í einum húsi, men at nógv kann gerast fyri at dempa tær. Til dømis við at keypa rætt inn av hvítvørum sum køliskápi og uppvaskimaskinu.

Í høvuðsheitum er talan um trý sløg av ljóðkeldum: Luftljóð (t.e. tað er luftborið, tos, ljóð úr hátalarum), trinljóð (t.d. tá fólk ganga, ella okkurt slær á gólv ella vegg) og bakgrundsóljóð frá føstum installatiónum (t.d. køliskáp, vatnrørsskipanir, ventlatión, o.s.fr.), har eftirklangstíðin spælir ein stóran leiklut, hvussu belastandi hetta óljóðið er.

- Tað er vísundaliga prógvað, at áhaldandi ljóð og óljóð ígjøgnum langa tíð, skaðar hoyrnina hjá fólki, og nógv gerast sjúk av tí. Men ljóðkeldurnar eru sera ymiskar. Um til dømis ein kinesari brestur beint við oyrað hjá tær, kann tað bresta tromhinduna. Í summum førum grør hon aftur, men í øðrum førum ger hon tað ikki. Og sjálvt um hon grør aftur, kunnu aðrir skaðar vera hendir við millum- og innara oyranum. Arbeiðir tú til dømis á einum barnagarði við nógvum gangi, gerst tú oftani móður og troyttur, og ert tú á einum arbeiðsplássi, har uppaftur meiri larmur er, til dømis á einum flakavirki í einum maskinrúmi, so verður hoyrnin spakuliga niðurslitin. Arbeiðir tú á eini skrivstovu, er týdningarmikið at óljóðkeldurnar; til dømis kopimaskinur og servarar, standa í einum øðrum rúmi, og at minkað verður um eftirklangstíðina, sigur Johannes Steingrund, ið síðani 2001 hevur ráðgivið ígjøgnum egna fyritøku, Steingrund Akustik.

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*